## Sigfríður sigrar
B36 heldur fast um góðu gongdina

*Fótbóltur s20-21*



## Lætt spæl hjá Víkingi
Runavíkingar hóttu slett ikki

*Fótbóltur s18*

Sosialurin
Mánadagur
12. apríl 2010

# Ítróttarblaðið



# EG VIL HJÁLPA TYKKUM

**OLYMPISKUR GESTUR**

*Sir Philip Craven, sum um vikuskiftið var í Føroyum í sambandi við 30 ára dagin hjá ÍSB, hitti eisini umboð fyri Ítróttarsambandið, sum greiddu honum frá strandaðu føroysku umsóknini um olympiska viðurkenning*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**OLYMPISK VIÐURKENNING** – Tað sera óheppið, at Føroyar eru fangaðir í ongamannalandi í olympiskum høpi, men eg vil fegin hjálpa tykkum at fáa samband við røttu fólkini, sigur IOC-nevndarlimur, sum vitjaði Føroyar um vikuskiftið

Hilmar Jan Hansen

Í sambandi við, at ÍSB leygardagin kundi hátíðarhalda 30 ára dagin fyri stovnan, var forkunnug vitjan, tí Sir Philip Craven, sum er forseti í altjóða paralympisku nevndini og limur í altjóða olympisku nevndini, var komin hendavegin til hátíðarhaldið. Tí var upplagt, at enski gesturin varð kunnaður um føroysku royndirnar at vinna olympiska viðurkenning.

– Nú er hetta mál púra nýtt fyri mær, men eg fari nú at royna at tosa við nøkur fólk í IOC fyri at greiða teimum frá málinum og vita, hvat tey halda um tað. Vónandi kunnu vit fáa í lag ein fund um málið, so vit finna fram til eina loysn, sigur Sir Philip Craven, sum saman við ÍSB-fólkum hevði tíðindafund fyrrapartin fríggjadagin.

– Hvør loysnin kundi verið, dugi eg ikki í løtuni at siga, men eg vil fegin gera mítt til, at tit kunnu sleppa ígjøgnum hjá teimum røttu fólkunum og upp á tann mátan skunda undir málið. Sum limur í IOC í mong ár, havi eg góð sambond, eg kann royna at brúka, so tit kunnu koma víðari.

Síðani 1984 hava Føroyar havt liggjandi umsókn um olympiska viðurkenning, ið tá uppfylti allar treytir fyri upptøku, men IOC »súltaði« umsóknina í áravís, til felagsskapurin í 1996 broytti reglurnar, so bara sjálvstøðug lond við ST-limaskapi kundu gerast limir.

– Hví reglurnar blivu broyttar, veit eg ikki, men tað hevði helst sínar orsøkir. Hinvegin er tað sera óheppið, at Føroyar eru fangaðir í ongamannalandi, so vit mugu royna at finna útav, hvat vit kunnu gera við tað. Nú havi eg fingið frágreiðing um tykkara mál, so eg vil gera mítt besta, men tað besta hevði verið, um ein avgerandi fundur kundi verið fingin í lag, sigur Sir Philip Craven.

– Eg skilji tykkum, tí tit eru errin av tykkara landi og tykkara tjóð, og tit vilja sjálvandi sleppa at gera tykkum galdandi allastaðni, har tit áttu at gjørt tað. Tykkara fótbóltslandslið spælir bæði EM- og HM-undankappingar, umframt at mær er sagt um ein sera góðan svimjara, tit hava, so eingin ivi er um, at fólk hava hoyrt um tykkum og kenna Føroyar ígjøgnum ítróttin.

# Fáa boðskapin út

**OLYMPISK VIÐURKENNING** Í ÍSF eru tey sera fegin um, at tey fingu høvi til at greiða IOC-nevndarliminum, Sir Philip Craven, frá søguni um vantandi føroysku olympisku viðurkenningina

Hilmar Jan Hansen

Í áravís hevur Ítróttarsambandið við hvørt givið høvi roynt at gjørt vart við, hvussu Føroyar av órøttum komu í klemmu, tá IOC broytti upptøkutreytirnar fyri olympiskari viðurkenning. Tí fegnast Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, um møguleikan at greiða enn einum IOC-limi frá føroysku støðuni:

– Vit høvdu ein góðan fund við Sir Philip Craven hóskvøldið. Hann lurtaði væl eftir tí, vit høvdu at fortelja honum, so kanska hann nú kann bera okkara boðskap fram fyri røttu fólkini í IOC. Longu í hesi vikuni ætlar hann at seta seg í samband við ein seniormedarbeiðara í IOC, sum hevur við limalond og upptøkuviðurskifti at gera, sigur ÍSF-forsetin.

Sir Philip Craven er ein sera høgtvirdur maður í IOC, bæði tí hann er nevndarlimur har, men eisini tí hann er formaður í altjóða paralympisku nevndini, IPC. Harumframt kemur so, at hann eisini telist millum teirra, ið fyrireika olympisku leikirnar í London í 2012, og at hann í javnan hevur samband við fólk, ið kunnu hava ávirkan á málið.

– At vit hava fingið møguleikan at fortalt Sir Philip Craven um gongdina í málinum, kann gerast sera týdningarmikið fyri, hvat hendir við málinum. Eg vil siga, at hetta hevur líka stóran týdning sum góða sambandið, vit hava við írska formanninum í europeisku olympisku nevndini, Patrick Hickey, sum tríggjar ferðir hevur bjóðað okkum við á teirra aðalfund, sigur ÍSF-forsetin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*